# Bót til bata opið hús 21. mars



Á triðja sinni bjóðar sjálvhjálparbólkurin Bót til bata øllum kvinnum, ið eru skurðviðgjørdar fyri bróstkrabbamein, til tiltakið Opið hús í felagshúsinum hjá Krabbameinsfelagnum.

Felagið sigur seg vilja vil røkka so nógvum kvinnum, ið hava ella hava havt bróstkrabba, sum til ber; tí vónar bólkurin, at nógvar kvinnur taka av tilboðinum.

Endamálið er at hava eina hugnaliga løtu saman, har møguleiki er fyri at tosa, stuðla, hjálpa hvør aðrari og veita hjálp til sjálvhjálp. Og royndirnar eru, at kvinnurnar eru fegnar um at koma saman á henda hátt, siga umboð fyri Bót til bata.

Bót til bata er sjálvhjálparbólkur undir Føroya felag móti krabbameini. Bólkurin varð stovnaður í 1988 og hevur verið virkin síðan. Í bólkinum eru kvinnur, sum eru skurðviðgjørdar í brósti. Tær hava fingið upplæring í at veita stuðul, vegleiðing og ráð til aðrar kvinnur, ið skulu skurðviðgerast ella eru skurðviðgjørdar fyri krabbamein í brósti.

Tiltakið verður í hølunum hjá Føroya Felag móti Krabbameini á Grønlandsvegi 58 í Tórshavn mikukvøldið 21. mars kl. 19.00.

Hevur tú hug at taka lut, vinaliga boða frá á telefon 317959, 217959 ella 217957, ella í telduposti: krabbamein@ krabbamein.fo

**Tiltakið er ókeypis.**

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, um kvøldið upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin upp í hvassan vind av landsynningi og kavi. Seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 0 og +3 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt, men seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið av landsynningi og sum frálíður regn. Hitin kemur upp í eini 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind millum landsynning og útsynning og regn. Týsdagin nakað minni vindur av útsynningi og suðri og ælingur. Hitin millum 4 og 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -5 |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -3 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 9 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 2 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | -6 |
| Moskva | -6 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | -5 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 11 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 7 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 1 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 971 hPa. yvir Norðsjónum fer spakuliga eystureftir. Ein veikur hátrýstryggur sunnan fyri Ísland verður yvir Føroyum fríggjanáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarnáttina

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/2 kl. 06⁰⁰– 27/2. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,3°
Minsti hiti máldur í februar: -11° - Mesti hiti máldur í januar: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 26/2 kl. 06⁰⁰– 27/2 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 132,0 mm









## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 19. februar | Mánin næstur jørðini |
| 24. februar | Fyrra kvarter |
| 3. mars | Fullmáni |
| 7. mars | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Mars | 04.52 | 17.14 | 03.52 | 16.14 | 04.07 | 16.29 | 06.52 | 19.14 | 07.52 | 20.14 | 03.07 | 15.29 | 02.07 | 14.29 | 05.07 | 17.29 | 06.07 | 18.29 | 04.37 | 16.59 | 05.52 | 18.14 |
| 2. Mars | 05.37 | 17.52 | 04.37 | 16.52 | 04.52 | 17.07 | 07.37 | 19.52 | 08.37 | 20.52 | 03.52 | 16.07 | 02.52 | 15.07 | 05.52 | 18.07 | 06.52 | 19.07 | 05.22 | 17.37 | 06.37 | 18.52 |
| 3. Mars | 06.17 | 18.37 | 05.17 | 17.37 | 05.32 | 17.52 | 08.17 | 20.37 | 09.17 | 21.37 | 04.32 | 16.52 | 03.32 | 15.52 | 06.32 | 18.52 | 07.32 | 19.52 | 06.02 | 18.22 | 07.17 | 19.37 |
| 4. Mars | 06.58 | 19.17 | 05.58 | 18.17 | 06.13 | 18.32 | 08.58 | 21.17 | 09.58 | 22.17 | 05.13 | 17.32 | 04.13 | 16.32 | 07.13 | 19.32 | 08.13 | 20.32 | 06.43 | 19.02 | 07.58 | 20.17 |
| 5. Mars | 07.37 | 19.56 | 06.37 | 18.56 | 06.52 | 19.11 | 09.37 | 21.56 | 10.37 | 22.56 | 05.52 | 18.11 | 04.52 | 17.11 | 07.52 | 20.11 | 08.52 | 21.11 | 07.22 | 19.41 | 08.37 | 20.56 |